# espiratorinum



Ein sum heilsaði upp á Jason Watt, var eiðismaðurin Heini Festirstein sum býr í Havn. Ellivu ár frammanundan, í 1988, kom Heini í somu støðu sum Jason, tá hann kom út fyri eini álvarsligari ferðsluvanlukku og breyt ryggin. Báðir eru teir eitt gott dømi um at tað ber væl til at liva eitt virkið lív eins og øll onnur hóast ein er avlamin og ikki kann brúka beinini. Heini arbeiðir sum grafikari hjá Sendistovuni og Jason er kappkoyrari








Jason Watt við sínum hvíta Seat Leon FR við 204 hk. Hann luttekur í superligaini innan motorsportin "DTC" (Danish Touringcar Challenge). Bilurin á niðastu myndini er privatbilurin hjá Jason sum er ein vanlig útgáva av Seat Leon

Danmark kemur hann inn á eitt 7. pláss yvir best umtóktu persónar í landinum.

Síðan 2008 hevur Jason Watt havt sítt egna team: Team Bygma Jason Watt Racing, har hann koyrir í einum hvítum Seat Leon FR við 204 hk. Tað er danska Bygma-konsernin, sum er høvuðssponsorur hjá Jason Watt. Virksemið hjá Bygma er innan handlar í byggivinnuna. Fyritøkan er tann størsta av sínum slagi í Danmark við 1350 starvsfólkum í Danmark og Føroyum.

Tað var í sambandi við at Balslevs Timburhandil og Bygma í Hoyvík lótu upp nýggjan handil, at Jason Watt vitjaði í Føroyum. Hann helt eisini fyrilestur um sítt lív fyri umleið 300 fólkum á Hotel Føroyum fríggjakvøldið.



*Nýggi Bygma handlinum »Hondverkarabúð« í Hoyvík lat upp fríggjadagin*

Mynd: Jens Kristian Vang



*Jason Watt heldur fyrilestur um sítt lív fyri umleið 300 fólkum á Hotel Føroyum*

Mynd: Hans Norðfoss